# tíðina




- Vit fáa ein sera góðan skúla við umbyggingini og útbyggingini, sigur Rúni Heinesen, skúlastjóri

**Í einum komandi blaði verður samrøða við Gunvá við Keldu, býráðslim í Klaksvík og sum hevur gjørt sær sína hugsan um, hvat skal til fyri at Klaksvík kann gerast ein sannur skúlabýur**

hesi útbyggingini.

- Vit hava somuleiðis aðrar ætlanir. Men skulu tær fremjast í verki er neyðugt, at vit fáa serumstøður til hetta. Enn hava vit ikki hesar umstøður, sigur skúlastjórin.

Ein av hesum útbúgvingum er ein sum eitur byggismiður, og sum minnir nógv um ta donsku útbúgvingina "struktør". Henda útbúgvingin er broytt, soleiðis at hon hóskar meiri til arbeiðið hjá handverkarum í dag.

Støðan er nevniliga hon, at teir, ið læra til timburmenn í dag, í størri mun enn áður arbeiða við so nógvum øðrum enn bert timbri.

Hetta vil aftur siga, at teir á skúlanum læra at arbeiða við timbri, men tá teir fara til arbeiðis úti á teimum ymisku byggiplássunum, so er munandi meiri arbeiði við betongi, kloakkering og í heila tikið, hvussu ein riggar eitt slíkt arbeiðspláss til.

Tað eru longu eini tvey ár

> *»Tey søgdu bart út, at vit máttu vera ørir í høvdinum at fara heilt norður til Klaksvíkar at ganga í skúla«*

síðani at skúlin sendi inn umsókn við fyrispurningi um at sleppa undir hesa útbúgvingina. Enn er einki svar komið frá myndugleikunum.

> *»Tað koma eisini javnan bæði næmingar, foreldur og heilir skúlaflokkar higar at vitja, fyri at síggja og uppliva við egnum eygum, hvør hesin skúlin er og hvørjar umstøðurnar eru«*

- Tað skal sjálvandi gerast ein íløga fyrst, og í hesum døgum kann tað gerast truplult at fáa eina slíka ætlan framda í verki.

- Men ætlanin er so kortini har, staðfestir Rúni Heinesen.

### Ikki bert fyri klaksvíkingar

Hóast hesin tekniski skúlin liggur í Klaksvík – ella kanska júst tí at hann liggur her – hevur hann verið rættiliga væl umtóktur millum tað unga lestrarhugaða fólkið kring landið.

Hóast ein tekniskur skúli er í Havn, kemur meiri enn so fyri, at næmingar úr høvuðsstaðnum leita sær til skúlan í Klaksvík.

Millum teir mongu næmingarnar á skúlanum eru í dag tríggir næmingar úr Hoyvík. Orsøkirnar til, at teir valdu hesa loysnina greiða teir tríggir frá aðrastaðni á síðuni.

Men skúlastjórin, Rúni Heinesen er ikki í iva um, at ein orsøk til hetta er, at næmingarnir hava møguleika at búgva á skúlanum.

- Hetta er eisini ein útbúgving, sum gevur teimum møguleika fyri hægri lestri, eins og teir hava góðar møguleikar at samantvinna teori og praksis gjøgnum verkætlanir.

### Kunning

Á hvørjum ári gera tey á Tekniska skúlanum nógv við at vitja framhaldsskúlarnar kring landið fyri at greiða teimum frá møguleikunum og tilboðunum sum skúlin hevur at bjóða teimum.

Og líkt er til, at umboðini frá skúlanum duga rættiliga væl at siga frá.

- Tað koma eisini javnan bæði næmingar, foreldur og heilir skúlaflokkar higar at vitja, fyri at síggja og uppliva við egnum eygum, hvør hesin skúlin er og hvørjar umstøðurnar eru.

- Vit kunnu so bara staðfesta, at alt hetta gevur úrslit, tí talið á næmingum hækkar hvørt einasta ár, staðfestir skúlastjórin, Rúni Heinesen.




- Hetta er ein góður skúli, siga teir tríggir næmingarnir – aftast vinstrumegin Ragnar Samuelsen og fremst vinstrumegin Teinar Mohr Hentze og Eirikur Jákupsson, avmyndaðir saman við Gunvá við Keldu, býráðslimir í Klaksvík

# Teir hildu okkum vera ørar

**Millum næmingarnar á Tekniska skúla í Klaksvík eru teir tríggir hoyvíkingarnir, Eirikur Jákupsson, Ragnar Samuelsen og Teinar Mohr Hentze. – Her er gott at vera, siga teir við ein munn**

NÆMINGAR
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** - Vit hildu, at hesin skúlin var meiri áhugaverdur enn tann í Havn. Og tí fóru vit higar, siga teir tríggir í stuttum viðtali við Sosialin.

Eftir teirra meting hevði skúlin í Klaksvík eina øðrvísi ætlan við undirvísingini, og sum hóskaði betri til teirra egnu áhugamál.

- Vit hildu, at skúlin í Havn var ov bókligur, meðan hesin í Klaksvík var meiri praktiskur - ein slapp meiri at brúka hendurnar og gera verkætlanir.

- Nú, ið vit hava gingið her á triðja ári, kunnu vit bara staðfesta, at okkara vónir til skúlan hava hildið, siga teir tríggir og vísa á, at skúlin haraftrat hevur fleiri breytir.

### Góð ár

Tá teir tríggir vinmenninir gingu í 10. flokki komu umboð fyri fleiri av miðnámsskúlunum á vitjan í teirra skúla.

Her greiddu tey frá tí, sum hesin skúlin hevði at bjóða. Og fyri teir tríggjar hoyvíkingarnar var eingin ivi: Tað sum umboðini fyri Tekniska skúla í Klaksvík borðreiddu við, var tað mest áhugaverda!

- Hetta hava verið trý ótrúliga góð ár her norðuri, sláa teir fast.

Ein grundhugsan í undirvísingini er, sum áður nevnt, at dentur skal leggjast á tað praktiska arbeiðið – tað er: at ein lærir um eitt evni, og fær síðani møguleikan at royna tað í verki.

- Hetta dámar okkum sera væl, siga teir tríggir.

### Ørir í høvdinum

Men tað var ikki uttan svørðsslag at Eirikur, Ragnar og Teinar fóru til Klaksvíkar. Vinfólk teirra dugdu als ikki at skilja hesa avgerðina.

- Ja, tey søgdu bart út, at vit máttu vera ørir í høvdinum at fara heilt norður til Klaksvíkar at ganga í skúla!

Teir hava tað gott her, búgva á skúlaheiminum og nýtast ikki eingang at fara út fyri dyr, tá teir skulu í skúlan. Og so fara teir til Havnar hvørt vikuskifti til hesi somu vinfólk síni.

Júst møguleikin at kunna búgva her, hevur eisini gjørt sítt til, at teir hava trivist so væl. Onkur teirra kendi onkran annan næming, sum hevði gingið her frammanundan, og haðani fekk hesin at vita, at tað var ikki so galið í Klaksvík hóast alt.

- Her kemur ein so at kenna nógv fólk ymsastaðni frá, og tað ger tað heila so áhugavert.